# Trivnaður og fakligheit - tvær síður av somu søk

TÓRA VIÐ KELDU



Ongin ivi er um, at tað, sum í skúlanum er serstakliga spennandi er, at skúlin er okkara produkt. Soleiðis, sum vit eru, soleiðis er skúlin. Fyri at fáa samanhang í greinina, havi eg vágað mær, at endurtikið nakað av tí, eg fyrr havi skrivað.

**Foreldur**
Í 2005 var orðaskifti í Klaksvik um skúlaviðurskifti, og høvdu vit tá vitjan av Solveig Gaarsmand, umboðandi Skole og Samfund, sum er ein felagsskapur umboðandi foreldur og ynskir teirra um ein góðan skúla.

Solveig Gaarsmand undirstrikaði, at foreldrini eiga børnini, men spurdi eisini, hvar foreldrini finna sítt pláss í gerandisdegnum í skúlanum? Foreldrini eru primeru uppalararnir av børnunum. Tey skulu vera fyrimyndir, tá vit tosa um atburð og samverutóna. Tey skulu uppala børnini at vísa virðing og fyrilit fyri øðrum.

Tað er jú júst hendan ábyrgdin, sum røkkur inn í skúlan. Foreldrini mugu tosa við børnini um, hvussu vit bera okkum at í skúlanum, og skúlin má draga foreldrini inn í arbeiðið við undirvísingarumhvørvinum á skúlanum.

Sum foreldur hava vit ongan rætt til ikki at hava tíð til børn okkara og tað, tey gera. Onki eitur ikki at fylgja við, hvat rørir seg í gerandisdegnum hjá barninum. Vit, sum foreldur, hava ábyrgd av, at tey verða før fyri at fóta sær í lívinum. Tey hava lívið fyri sær og hava brúk fyri vegvísara.

Foreldur eru ikki sum fyrr tey, ið til eina og hvørja tíð gera av og siga, "hvar skápið skal standa". Haldi, hetta ger, at foreldur oftari nú enn fyrr standa spyrjandi og vita ikki rættiliga, hvat tey skulu gera. Tó er grundarlagið og ábyrgdin undir uppalingini ikki broytt.

**Samfelag og mentan**
Sjálvt um vit liva í einum lítlum og vælskipaðum samfelagi, síggja vit fleiri stórbýar drøg. Rákið seinastu árini hevur rættiliga trýst lítla egoistin fram í ljósið. Vit eru sjálvupptikin og hava lítla tíð til hvønn annan. Vit eru ikki serliga góð til at brúka tíðina rætt. Tí kenna vit nýggja stemplið, fleiri fáa, sum er strongd. Ikki tí at døgnið er ov stutt, men tað, vit mugu læra í "nýggja" samfelagnum, er at raðfesta.

Føroyska mentanin er sera merkt av, at vit eru eitt oyggjasamfelag. Veður, vindur og dagsins gongd skapa okkum. Hetta hevur í longri tíð skapað eitt róligt og avslappað fólkaslag. Føroyingar eru ikki serliga kritiskir og krevja ikki nóg nógv av sær sjálvum. Vit eru ikki serliga langskygd, sera fleksibul og halda, at vit kunnu gerast bestir, uttan tó at arbeiða hart fyri sakini.

**Skúlin**
Ikki hevur tað so lítið at siga, at vit eru partur av einum øðrum landi, sum líkist sera lítið okkara egna. Hetta sæst sjálvandi aftur í skúlanum. Fleiri av lógunum eru beinleiðis týddar. Fólkaskúlalógin er sera flosklakend og er sera vælljóðandi. Hon er sjálvandi ein greining av almennu krøvunum, men vit mugu minnast til, at tað, sum stendur á skrift, er ikki altíð tað, vit síggja í verki. Ofta er langt frá bókstavi til verk, um vit kunnu siga so.

Vit taka frá øðrum, uttan at vita, hvat vit sjálvi vilja. Eitt aktuelt dømi er PISA. Onnur lond, sum hava sett fólk ella heilar deildir av til júst at kanna og menna eina ávísa skipan. Hetta hava vit ikki, tó gera vit tað sama. Somuleiðis er við foreldrasamstarvinum. Lógin sigur, at skúlin skal í samstarv við foreldur, men tað gerst skjótt óskipað, tá hon onki sigur um hvussu.

**Lærarar**
Arbeiði - alt arbeiði - eigur at vera merkt av førleika. Fakfólki eru lærararnir, sum arbeiða á skúlanum. Vit eru bólkurin í hesum samanhangi, sum hevur fakligheit, vitan um lærutilgongdir og eiga vit tí sum lærarar at vera nóg professionellir og engageraðir at skapa eitt gott og gevandi umhvørvi fyri næmingarnar.

Ein av trupulleikunum í skúlanum í dag er broytti læraraleikluturin. Fyrr var lærarin ein, sum oysti næmingarnar undir í vitan, meðan teir stillir sótu og lurtaðu. Seinastu tíðina hevur rákið verið, at næmingarnir skulu hava ávirkan á teirra skúladag, teir eru ikki autoritets trúgvir og mangla virðing fyri vitan. Lærarin hevur broyttar fortreytir og má her fóta sær við onkrum nýggjum slagi av autoriteti. Lærarar eru kanska ikki nóg væl útbúnir til nýggju uppgávuna.

Flestu foreldur í dag hava útbúgving og krevja meir, enn foreldur gjørdu fyrr, hetta er tó ongin trygd fyri, at tey krevja nakað av sær sjálvum. Við øllum hesum í huga, er neyðugt, at skúlin sigur, hvussu fram skal farast.

**Næmingar**
Næmingar eru sum heild glaðir at koma í skúla og at vera í skúla. Størsti trupulleikin hjá næmingum okkara, um vit skulu tosa um Pisa og royndir sum heild, er, at teir als ikki verða stýrdir soleiðis, sum eitt nú finskir ella japanskir næmingar. Vit hava eina sera "humana" mynd av børnum, og hetta sæst eisini aftur í skúlanum. Bæði gott og minni gott. Eg haldi, at vit krevja ov lítið av næmingunum og børnum okkara.

Næmingarnir eru teir, sum til eina og hvørja tíð skulu vísa, hvat teir hava lært - fakligheit. Fyri at læra skulu teir hava tað gott, og er trivnaður ein avgjørd fyritreyt. Í hesum samanhangi er tað næmingurin, sum er í miðdeplinum, og sum skal hava eina góða og gevandi skúlatíð.

**Heim og skúli - trivnaður og fakligheit**
Tá fólkaskúlin leggur upp til, at skúlarnir skipa foreldraráð á skúlunum, er tað sjálvsagt út frá ymiskum kanningum, sum vísa, at foreldur hava eina so ovurstóra ávirkan á síni egnu børn – nógv størri enn lærararnir. Her verður grundvøllurin lagdur, og her verða virði skapt saman við virðing fyri familju, vinum, skúla, lærara, leiðslu, skipanini, politikarum, løgreglu, rætt og skeivt o.s.fr.

Áhugaverdar kanningar vísa, at positivt, aktivt og málrættað arbeiði bera frukt. Hetta krevur, at næmingarnir eru klárir, orka at savna hugsanir og gera eitt gott arbeiði.

Tó lærir eingin av "bara" at kenna seg tryggan, nei, her skal eisini eitt fakligt umhvørvi til. Trivnaður og fakligheit eru jú tvær síður av somu søk - eins og foreldur og skúli eru tað.

# CHEðiligt við ABC

BERGTÓRA H. JOENSEN



Í vikuni fingu vit at vita, at ABC ikki hevði ætlanir um at raðfesta barnsins 1. sjúkradag við løn.

Tað átti at verið ein sjálvsagdur rættur. Rætturin mong longu hava, men summi enn ikki eiga.

Í vár var uppskot um barnsins 1. sjúkradag á tingi. Argumentið fyri at atkvøða ímóti var, at eingin kærumøguleiki var í lógini, og vit skuldu hyggja nærri eftir norskari lóg sum segðist at vera góð. CHE samgongan skuldi í heyst leggja uppskot fram um barnsins 1. sjúkradag. Seinast í august fingu vit at vita, at í heyst var tað klárt. Vit bíðaðu í tolsemi, vistu lítið tá.

So kom ABC til og vit undraðust, nú novembur mánaður kom, hvar uppskotið mundi blíva av. Svarið frá landsstýriskvinnuni var greitt: "Vit hava ikki raðfest hetta málið – vit raðfesta eina nýggja forsorgarlóg og at eldraøkið verður lagt út til kommunurnar!" Skilagóðar raðfestingar, MEN ikki nóg gott, um alt annað dettur burtur.

**Hvør verður við sviðusoð?**
Meini so við, tey sum enn ikki eiga rættin til barnsins fyrsta sjúkradag við løn, eru tey sum hava lægst løn, vánaligast pensjónsskipan og bert fáa sjúkradagpenging undir sjúku. Vit kunnu ímynda okkum, hvussu tað ávirkar húsarhaldið, um fleiri børn í einari familju hava verið smásjúk og mánaðarlønin verður ávirkað av hesum.

**Føroysku barnafamiljurnar**
Kanningin, sum Norðuratlantsbólkurin gjørdi, um hví føroyingar velja at búseta seg í Danmark vísti, at ein orsøk til at føroyingar valdu Føroyar frá vóru vánaligar sosialar skipanir. Ein vælvirkandi sosial skipan kundi inniborið, at øll foreldur høvdu rætt til barnsins 1. sjúkradag við løn.

Sum er, fáa føroysku kvinnurnar flest børn í Europu, men hvussu leingi kunnu vit vænta at tær halda áfram við tí, um vit ikki í minsta lagi tryggja familjunum hendan rættin?

**Partarnir á arbeiðsmarknaðinum**
"Hatta kunnu partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir finna út av," havi eg hoyrt fleiri siga. Tað hevði verið veldugt, ja! Men skulu vit bara lata standa til, nú tað enn ikki er eydnast teimum? Skulu kanska eisini siga, at tað almenna skal hvørki rinda ella blanda seg upp í pensjónsviðurskifti? Ella at okkum onga arbeiðsskaðalóg tørvar, tí tað mugu partarnir á arbeiðsmarknaðinum sjálvir finna út av?

**Rós til Rósu**
Eg ætli mær ikki at ásanna, at andstøðupolitikarar onga ávirkan hava. Tí frøddist eg almikið í dag, tá Rósa Samuelsen segði, at hon ætlaði at samstarva við allar flokkar um bústaðarpakkan, so hann gjørdist eitt felagsbarn. Vóni hesin leistur fer at verða nýttur í størri mun framyvir – stórt rós til tín Rósa Samuelsen! Men heldur tú ikki, at tú hóast alt kanst samtykkja um at raðfesta, at øll foreldur hava rætt til barnsins 1. sjúkradag við løn?

# Familjuguðstænasta?

JOHN S. MYLLHAMAR



Donsku fjølmiðlarnir vistu fyri stuttum at siga, at nýggir, ungir prestar í Danmark duga ikki at gera tænastu í kirkjunum. Teir eru ikki bara kirkjufremmandir, men vita als ikki, hvat ein hámessa er og hvat hon inniheldur, tí eingin hevur lært teir tað, áðrenn teir gjørdust prestar. Teir hava bara fingið starvið, tí teir hava lokið prógv í guðfrøði á universiteti.

Vónandi stendur ikki so illa til við føroysku prestastættini. Men tú undrast, hví nakrir prestar í Føroyum kunnu finna uppá at lýsa við familjuguðstænastu á miðdegi sunnudag. Og tú spyr teg sjálvan: Hvørjum málbólki er tá guðstænastan næsta sunnudagin ætlað, tá ið hon ikki er ætlað familjuni? Er guðstænastan á miðdegi sunnudag, ikki tann stóra familjuguðstænastan, har ommur og abbar, mammur og pápar við børnunum fara í kirkju? At lýsa við familjuguðstænastu á miðdegi sunnudag, kann ikki hava aðrar fylgjur, enn at hámessan verður undirgravað, at fólk sita eftir við tí holdningi: "Vit fara ikki aftur í kirkju fyrr enn tað verður guðstænasta fyri alt húsfólkið". Hetta kann so bara hava við sær, at hámessan gerst meira og meira fremmand fyri fólki.

Prestar áttu heldur at lagt seg eftir, at ført inn aftur hámessuna við øllum teimum liðum, ið veruliga hoyra guðstænastuni til – ikki minst við altargangi, og aftur at skapt hátíð og halgifrið ta løtuna, vit savnast í Guðs húsi ein sunnumorgun. Og tað skuldi avgjørt verið krav, at ein, sum gerst prestur og hirði, fyrst hevði lært, hvar ein hámessa er og hvat hon inniber, og at guðstænastan á miðdegi sunnudag, kann ikki vera avloyst av alternativum guðstænastum.

Nógvar av teimum alternativu guðstænastunum eru ikki mennandi fyri hámessuna, fyri høvuðsguðstænstuna - ta stóru familjuguðstænastuna.